# Føroysk sniðgeving í serflokki



FRAMSÝNING
*Norðurlandahúsið*

Forvitnislig framsýning er í Klingruni í Norðurlandahúsinum í løtuni. Hetta eru "bestubitar" úr eini størri heild av føroyskari sniðgeving, sum varð sýnd fram, tá ið Norðurlandahúsið hátíðarhelt sín 25 ára føðingardag fríggjakvøldið 9. mai. "Bestubitarnir" eru sniðgivnir av Jóhannu av Steinum, Guðrun&Guðrun og Barbaru í Gongini, og tað er Barbara, sum við síni kønu hond hevur lagt framsýningina til rættis.

Framsýningin er eisini partur av einum øðrum átaki innan føroyska sniðgeving; "Eggin – færøsk design med kant", sum hevur verið sýnd fram bæði á Bryggjuni í Keypmannahavn og í Trapholt í Kolding. Nøkur av somu pløggum hava eisini verið ein túr í Brússel í sambandi við Atlantic Soundscapes, men nú er so møguligt at fáa eina nærmynd av frálíku føroysku sniðgevingini í Norðurlandahúsinum.

Framsýningin hongur uppi inntil 1 juni, og um onkur hevur hug at ogna sær okkurt plaggið ber til at fáa kunning frá avgreiðsluni í Norðurlandahúsinum. Norðurlandahúsið er opið mánadag – leygardag kl. 10.00 – 18.00 og sunnudag kl. 14.00 – 18.00. Meira kunning er at fáa á www.nlh.fo



*Starvsfólk á TRYGD taka ímóti vinninginum frá Kiwanis, sum nú er latin víðari til Skótadepilin á Selatrað. (mynd: Kalmar)*

## Skótadepilin á Selatrað fekk bátin

TRYGD
*Tíðindaskriv*

Í 2007 vann Trygd bátin sum Kiwanis Tórshavn lutaði burtur á Ólavsøku. Talan er um eitt stórt fimmmannafar sum bátabyggjarin Terji Reinert Jacobsen í Leynum hevur bygt.

Báturin hevur eitt søluvirði áljóðandi 45.000 kr.

Nú hevur TRYGD gjørt av at lata bátin víðari til Skótadepilin á Selatrað. Endamálið við at lata bátin til Skótadepilin er, at TRYGD ynskti at lata bátin til onkran ið veruliga kundi fáa nyttu burturúr honum.

Eisini var tað týdningarmikið at báturin bleiv latin til okkurt landsdekkandi endamál.

Hesum taka bæði Skótadepilin á Selatrað og Kiwanis Tórshavn undir við og fegnast tey tí saman við TRYGD um, at báturin verður latin til depilin.

Skótadepilin á Selatrað kann vera nýttur av øllum skótum í Føroyum umframt at tað stendur einum og hvørjum frítt at leiga hølini á Selatrað.

TRYGD vónar at Skótadepilin fær gleði av bátinum og ynskir teimum góða eydnu frameftir.

## The Dreams aftur á Boogie-toppinum



TÓNLEIKUR

The Dreams er fyrsti føroyski bólkur, sum hevur megnað at fáa tvey løg nummar eitt á Boogie listanum hjá DR.

Í Pegasus situr í hesum døgum ein ovurfegin Hans Edward, frontmaður í bólkinum The Dreams. Hann hevur góða grund til at fegnast, tí The Dreams hava enn eina ferð skrivað føroyska tónleikasøgu. Fyrstu ferð var, tá ið The Dreams lógu ovast á Boogie listanum hjá DR og ovast á 15 teimum bestu hjá ÚF í senn. Hesa vikuna liggja The Dreams aftur ovast á Boogie listanum við lagnum Himlen Falder/Helvede Kalder.

The Dreams skulu spæla nógv í summar, og í august kunnu teir upplivast fyri fullum útblástri á Vágsbø.

## Ruddingardagar í Tórshavnar kommunu 16.-17. mai

TÍÐINDASKRIV
*Tórshavnar Kommuna*

Tórshavnar kommuna vil heita á øll um at fara út í náttúruna at rudda ruddingardagarnar. Skótar, ítróttarfeløg onnur feløg o.o kunnu stuðla hesum tiltaki við at rudda hvør sítt øki. Virkir, stovnar og handilsrekandi kunnu rudda nærumhvørvið.

Ruddingardagarnir eru hesir:

Fríggjadagin 16. mai rudda skúlar og barnagarðar.

Leygardagin 17. mai rudda eigarafeløg, skótar og ítróttarfeløg.

Kommunan heitir eisini á onnur um at rudda frí – og felagsøki.

Tað er týdningarmikið, at ruskið verður skilt sundur til Endurnýtsluna í hesar ruskbólkar:

Rusk at brenna: Viður, plastikk, gummi, flamingo, pappír og papp.

Jarn og metal: Hegn, jarnrør, billutir, súkklur og ymiskir jarnlutir.

Rusk at tyrva: Kloakkrør av PVC, takrennur, impr. viður, bjálving, asbest, glas og leirvørur.

Dálkandi burturkast: Akkumulatorar, máling o.a. skal leggjast og avhendast fyri seg í Endurnýtsluni ella á bingjuplássunum.

Rusksekkir fáast ókeypis á Endurnýtsluni á Hjalla, gomlu Brandstøðini á Varðagøtu og á hesum bingjuplássum:

Óðinshædd, Skálatrøð, við skúlan á Løgmannabreyt, á parkeringsplássinum við Handilsskúlan, á parkeringsplássinum við Støðlagøtu á Argjum og í Havnardali.

Í Kollafirði, Kaldbak, Norðadali, Hesti og Nólsoy verða posar lagdir við bingjurnar. Í Syðradali, Kaldbaksbotni, Koltri og á Sundi verða posar bornir út.

Í sambandi við ruddingardagarnar kann ringjast til Reinhaldið hjá Tórshavnar kommunu á tlf. 254010, til Kollafjørð á tlf. 254003 og til Nólsoy á tlf. 214069. Um ikki ber til at avhenda ruskposarnar á bingjuplássunum, ber til at venda sær til Tórshavnar kommunu á tlf. 254010 og avtala, at posarnir verða settir fram við vegnum, soleiðis at Tórshavnar kommuna avheintar hesar. Í sambandi við ruddingardagarnar kann ringjast til kommununa og boða frá, um størri burturkast frá náttúruni skal avhendast.

Meira fæst at vita á www.torshavn.fo

## Stórur gravgangur eftir Sex and the City atgongumerkjum

UNDIRHALD
*kvinna.fo*



Bert eitt samdøgur eftir at Kvinna byrjaði søluna av atgongumerkjunum til Sex and the City filmin, er fyrsta sýning longu útseld. Ferðslan inni á Kvinna.fo hevur verið stór síðani sølan byrjaði. Bæði eftir atgongumerkjum til filmin og til stóra tiltakið, sum Kvinna skipar fyri seinni um kvøldið í høllini á Hálsi 6. juni.

Saman við metrovinkonunum Carrie, Samantha, Miranda og Charlotte bjóðar Kvinna til filmsfrumsýning, sensuelt mótashow, cocktailbarr, konsert, dans og metropolstemning. Og hetta er, eftir øllum at døma, nakað sum eisini føroyskar kvinnur eru áhugaðar í. Men einki Sex and the City uttan Mr Big, og tí er hettar eisini eitt tiltak fyri føroyskar menn. Sjálvt um filmurin kanska mest tiltalar kvinnurnar, so mugu mennirnir koma til tiltakið í Høllini á Hálsi, tí hetta verður ársins kvøld in the City.

Kvinna samstarvar við Býin.fo, sum eigur dansistaði Rex, og fíggjakvøldið 6 juni, tá tiltakið verður í høllini á Hálsi, er Rex stongt. Atgongumerkini til bæði film og tiltak eru at fáa á Kvinna.fo.